## Tøkk



Hjartaliga takka vit tí stóra skara, ið hendan góðveðursdag í adventini fylgdi kæra manni mínum og góða pápa, verpápa, abba og langabba okkara

**Torstein Christiansen**

sum eftir eina langa sjúkralegu stillisliga legði árarnar inn eftir ein langan og strævnan arbeiðsdag, ið var at enda komin.

Tøkk til Jákup Reinert, prest, fyri góð orð í kirkjuni og tær avbera vøkru røddir frá sangarunum. Takk til gravarar, klokkara, tey ið komu við køkum, fyri blómur og kransar og vitjan á ymiskan hátt.

Tøkk til tykkum á Áargarði, at tit vóru góð við hann ta tíðina hann var hjá tykkum. Elisabeth og aðrar, sum gjørdu til ervið niðri á Keldu. Ein serlig tøkk til allar abbasynirnar, sum stóðu við kistuna, meðan sungið varð »Gleðilig jól«, áðrenn teir bóru hana út. Ein jólafriður fylti kirkjuna hesa løtuna.

Tøkk øll somul.
*Gleðilig jól og Harrans signing í komandi ári.*

*Familjunnar vegna*
**Sólrun**
**Sunbjørg, Linjohn, Birthe og Agnas**
**við familjum**

*»Eg veit væl, at eina tín frelsarahond*
*kann føra um havið mítt far*
*til vitarnir lýsa á kendari strond*
*og havnina eyga mítt sær«*

# Fimm ættarlið



*Á myndini eru f.v.: Ada Petersen (olduromma), Petur Petersen (langabbi), Jógvan William Petersen (abbi), (Petur Drangberg Petersen (pápi) og Jógvan Drangberg Petersen (sonur). Oldurabbin Jógvan Petersen var blivin sjúkur um hetta mundi. Lítli Jógvan varð føddur 15 september 2009, sum oldurabbin andaðist 23 oktober 2009. Av tí at abbin (Jógvan William Petersen) sigldi í Danmark og ikki var heima hesa tíðina, eydnaðist ikki at fáa ættarliðsmynd við oldurabbanum saman við oldurommuni Adu Petersen*



*Á myndini eru f.v.: Margretha Marteinsdóttir (olduromma), Ingibjørg Drangberg (langomma) Yvonna Drangberg (omma), Petur Drangberg Petersen (pápi) og Jógvan Drangberg Petersen (sonur).*

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo

Fyri 25 árum síðan:

# Heinaberg koppaði á Skála

Sosialurin skrivar hósdagin 6. desember 1984 um trolaran Heinaberg sum koppaði, tá hann fór á sjógv á Skála Skipasmiðju týskvøldið 4. desember. Fimm mans vóru umborð, tá óhappið hendi, men teir fingu ongan skaða. Trolarin varð bygdur til P/f Heinaberg á Strondum.



Her liggur Heinaberg